# fyrst og fremst eitt ball

sleppa inn á konsertøkið. Hetta hevði stóran bíðirøðir við sær, bæði við sølulúkuna, og við inngongdina í garðin. Við inngondina stóð ein durðavørur við eitt lítið portur, og slapp einum og einum inn, trýstið var øðiligt, og tað kendist eina løtu hættisligt. Durðavørurin var heldur ikki sína uppgávu vaksin. Hann ilskaðist inn á trýstið, og royndi at kroysta aftur ímóti, fólk vóru sostatt illa kroyst. Hetta er sera óheppið og kundi havt ein sorgarleik við sær.

**Tómt konsertøki**

Tá Tim fór av pallinum hvurvu áhoyrararnir aftur. Terji og Føstufressar spældu fyri umleið helvtini av áhoyrarunum. Hetta er ein samleikakreppa hjá 20 ára gomlu konsertini, ið noyðist at endurskoða sítt konsept.

Um konsertin vil gerast til annað enn byrjanarballið á ólavsøku, og vil tekkjast eini eldri áhoyrarafjøld, so er Kommunuskúlagarðurin ikki eitt verandi stað. Betong og asfalt tykist øðiliga ósjarmerandi samanborið við sand og gras í hugnaligum bygdaumhvørvi. Eg skal verða tann fyrsti at viðganga, at eg ikki tími at standa í tímavís í Kommunuskúlagarðinum, um eg heldur kann sita á Gøtusandi ella niðri á Sand á Sandi. Umhvørvið má vera hugnaligt, tað er eitt krav frá eldru áhoyrarunum.

Men spurningurin er, um hví konsertin skal hava eldri áhoyrarar. Konsertin hevur havt yvir 3000 áskoðarar í nógv ár. Tað eru serlig yngru ólavsøkugestirnir, sum brúka konsertina sum eitt slag av byrjanarballi. Í ár mistu fyrireikararnir nógvar av hesum áhoyrarunum, møguliga tí teir, stutt sagt, ikki høvdu ráð til høga prísin á atgongumerkjum, sum var kroystur upp av dýru hýruni hjá Tim Christensen.



## Tim Christensen



Høvuðsnavnið á konsertini Tim Christensen fór á pallin eina løtu eftir miðnátt. Danski tónleikarin og tónasmiðurin hevur bæði, sum einstaklingur og í Dizzy Mizz Lizzy givið nógvan tónleik út av ymiskari góðsku, nýggjasta fløgan Honeyburst er friðarlig og innilig, og brýtur frá tí tónleikinum, sum Tim fyrr hevur gjørt. Hetta fjøllbroytni merkti eisini konsertina. Fyrstu løgini vóru í rokkutta endanum, uttan at verða serliga fangandi. Tað var ikki fyrr enn vakra inniliga lagið "Surfing the Surface", at konsertin gjørdist ordiliga góð, í rokkpettinum fór alt at kóka. Tíanverri slapp gittarleikarin Lars at syngja næsta lag, og tað var eitt ringt lag, hetta drap aftur allan stemningin.

Konsertin gjørdist tó betur og betur, við fleiri løgum av Honeyburst, sum "Whispering at the top of my lungs" og "Right next to the right one", í seinna lagnum vóru tendrarar og skrálandi áskoðarar í niðurløgunum. Tá teir spældu Dizzy Mizz Lizzy lagið "Silverflame" fór alt at kóka. Konsertin var ordiliga góð, serliga í teimum inniligu løgunum var tað frálíkt, men samstundis vóru karmarnir ikki serliga væl egnaðir til hetta slagi av konsert.



## Á ferð í Fressaland



Terji og Føstufressar spældu øll tey gomlu føstufressaløgini og nøkur av teirra nýggju løgum, har vóru klassikarar sum "Kvøld á Tinganesi", "Lívið er á okkara gáta", "Mamma" og "Apokalypsa", og hæddarpunktið vakra lagið "Eyðstein". Føstufressar eru allir millum bestu føroysku tónleikararnar, og teir spældu, sum ein dreymur. Men tíanverri sang Terji ikki so reint alla tíðina, tað var rættuliga keðiligt, tí løgini og tónleikararnir vóru so øðiliga góð.

Umframt gomlu løgini vóru eisini nýggj føstufressaløg á skránni, okkurt hevur Terji longu spælt í Prix høpi, men har var eisini okkurt heilt nýtt. Tá Terji fór á pallin vóru nógvir av áhoyrarunum rýmdir, og tá hann fór av pallinum, rýmdi restin.

## Eingin lurtaði og eingin svaraði

**Ólavsøkukonsertin hevur ein keðiligan vana at taka fullkomiliga ókend donsk orkestur við føroyskum sangarum við á Ólavsøkukonsertina, og seta tey at spæla seint. Fyri nøkrum árum síðan var tað Rowan og í ár Super Sonic, har Edmund "fyrrverandi Chase" Jakobsen syngur. Bólkurin spældi væl, og hóast trummuleikarin ikki var nakar Føroya meistari, so var tónleikurin góður harður rokkur. Edmund brúkti røddina nógv annarleiðis, enn hann gjørdi í Chase, og tað klæddi honum. Men áhoyrararnir vóru slettis ikki við. Edmund dugdi slettis ikki at avlesa hetta, og bleiv við at spyrja áhoyrararnar: "Vilja tit hava rokk" uttan at nakar ønti honum aftur. Men hóast teir fullkomiliga líkaglaðu áhoyrarnar, sum hvurvu ein fyri og annar eftir, so blivu Super Sonic við at spæla.**

## Eittveitii

Tá Eager to Please endiliga sloppu á pallin, var klokkan tólv minuttir í fýra, konsertin hevði verið seinkað alt kvøldið, og fyrireikararnir høvdu kroyst so nógv nøvn inn á skránna, at einki pláss var fyri seinkingum. Tá Tim Christensen so spældi fleiri eykaløg, varð einki pláss eftir til seinasta bólkin. Hetta var synd fyri Eager to Please, og ov vánaligt fyriskipað.

Teir byrjaðu undir hinum orkesturnavninum Orkestriii her Vestriii og spældu útvarpshittið "Eittveitiii". Síðan fóru teir undir sína egnu skrá og løgdu fyri við "Iron man" hjá Black Sabbath. Teir 200 áhoyrarnir, sum enn vóru í garðinum vóru sera við uppá tað.

Tá klokkan gjørdist fýra varð ljóðannleggið sløkt, men Eager to Please spældu víðari, aftan á eina løtu var eisini ljóðið á pallinum sløkt, og tá góvust teir. Bólkurin spælir sín 70'ára rokk framúr væl, og hevði uppiborðið at sloppið at spælt.

## ...gu Poppkorn

...eina stutta konsert á stóra pallinum, ...sen setti útgerðina upp. Hetta virkaði ...er upptikin áðrenn, men røddirnar eru ...et the party on", sum er eitt ordiliga ...sum Kári Jakobsen hevur skrivað til tær, ...ann deiliga Havn". Eg hoyrdi tær á MjúS ...n, sum syngur, er, sum fødd til at standa ...sertini vóru eisini dansarinnurnar nógv ...ara, og tað sáðst. Tó tyktist koreografiin ...ndi verið eitt sindur meira kekka.

## Sonur Óla í russarahúgvu

Side Effect gevur seinni í ár fyrstu fløguna út. Ólavsøkukonsertin var tí ein smakksroynd av hvat vit kunnu vænta okkum, og tað ljóðaði lovandi. Bólkurin hevur onkuntíð fyrr tykst rættuliga leitandi. Serliga hevur Ludvík Breckmann teirra MC ofta hevur vassað út, har hann ikki grinnur. Men á Ólavsøkukonsertini var alt hetta burtur. Bólkurin tykist at hava funnið sína hill. Ludvík var betri enn nakrantíð fyrr. Hann hevur sterka útstráling á pallinum, og eina fína men rættuliga smala rødd. Tá hann heldur seg til tað, sum hann megnar, er tað ordiliga feitt, og tað gjørdi hann hesuferð.

Pápi Ludvík, Óli Breckmann var millum áhoyrararnar, og hann smíltist tá sonurin kom á pallin í russarahúgvu. Óli hevði onga viðmerking um framførsluna, men av smílinum at døma hugnaði hann sær. Tað hevði hann eisini orsøk til. Side Effect spældu góðan harðligan teknorokk, og gjørdu tað væl. Áhoyrararnir vóru ikki nógvir, men livdu væl við.

Tekstirnir vóru á enskum og føroyskum, og hóast rýmini tyktust eitt sindur hjálparleys í støðum, vóru tey sjarmerandi á onkran hátt.

Umframt teirra egnu løg, spældi Side Effect Murder #1 hjá MC-Hár, og teir spældu hann, sum hann altíð átti at verða spældur, inn í lagið vóru blandaði tekstpettir úr Ólavsøkurappinum, og henda eitt sindur freka tolking, riggaði ordiliga væl. Hetta lagið fekk fólki enn meira við, og tá Mikkjal Gaard úr Sic kom á pallin at syngja seinasta lag, kom ordiliga gott lív í.